UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 2

Ummælisskjal

Niðanfyri er ein stuttur samandráttur av innkomnum hoyringarsvarum:

SEV og Kommunufelagið hava í stóran mun somu viðmerkingar og ynski til lógaruppskotið. Serliga er tað ynskið um, at lógaruppskotið skal vera í samsvari við semjuskjalið millum landsstýrið og SEV frá 2022, sum fyllir nógv, og at reglur ikki verða ásettar um evni, sum ikki eru liðugt viðgjørd í arbeiðsbólkum, sum skulu setast við støði í semjuskjalinum at viðgera ymisk evni meira nágreiniliga. Tí er uppskotið eisini tillagað nakað, serliga viðvíkjandi kravinum um, at loyvisskipanin fevnir um øll elframleiðsluverk upp í 200 kW, tó so at hesi frameftir kunnu fáa loyvi við standardtreytum. Eisini er ásett, at elframleiðsluloyvi bara kunnu leingjast eina ferð við 20 árum. Hetta er tó ikki galdandi fyri skipanarberandi eindirnar hjá SEV, tí tey loyvini kunnu leingjast fleiri ferðir.

Ein tíðarfest orkuútbyggingarætlan fyri komandi 5 árini er gjørd við støði í § 11, stk. 3, og semjuskjalinum. Henda ætlan ger, at tað ikki longur verður mett at vera sami tørvur á einari sonevndari open-door-skipan, sum tí er strikað. Alment útboð og loyvisveiting verða frameftir í mestan mun hildin og avgreidd í samsvari við tíðarfestu útbyggingarætlanina, so at íløgur í og útbyggingar av elnetinum og nýggjum framleiðslueindum betur kunnu fylgjast. Eisini verður staðfest, at bara SEV hevur loyvi til elnetsvirksemi. Hetta fyri at tryggja eitt samhaldsfast elnet til at flyta øllum kundum í landinum el.

Viðvíkjandi elsølu er semja millum landsstýrið og SEV um, at SEV framhaldandi skal kunna selja el til verandi kundar. SEV hevur ynskt rúma skiftistíð at fyrireika ein elsølumarknað við dagligum útboðum og rúma tíð at tryggja bygnaðarliga skilnaðin millum netvirksemispartin hjá SEV og skipanarberandi tænastur øðrumegin og kappingarútsett virksemi, sum lutafelagið eigur og rekur einsamalt ella saman við øðrum, hinumegin. Tí er ein kunngerðarheimild útvegað landsstýrisfólkinum at seta hesar reglur í gildi, tá sølumarknaðurin er klárur og bygnaðarligu broytingarnar í SEV eru samtyktar á aðalfundi.

Landsverk vísir á, at freistirnar í ásetingini um at boða eigarum frá ætlaðum grevstri í lendinum og freistin hjá eigarum at mótmæla slíkum inntrivum eru heldur stuttar. Eisini mælir Landsverk til, at lendið skal bøtast aftur í sama stand. Mótmælisfreistin er tí longd upp í 8 vikur meðan freistin at boða frá slíkum inntrivum er longd til 12 vikur.

Brúkaraumboðið vísir á, at brúkaraverndin hjá elkundum ikki tykist vera á jøvnum føti við brúkaraverndina hjá fjarhitakundum, og at neyðugt er at seta krøv til útgreinaða elrokning, marknaðarføring, atgongd at upplýsingum viðvíkjandi nýtslu og prísum, framferðarhátt við gerð og broyting av viðskiftatreytum, uppsagnarreglur o.a.m. Viðmerkingarnar eru í mestan mun tiknar til eftirtektar við at broyta ásetingina og geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta ítøkiligar reglur í kunngerð, sum tryggja størri brúkaravernd á el- og fjarhitaøkinum.

Maskinmeistarafelagið stúrir fyri, at veitingartrygdin kann vera í vanda, um elframleiðslan hjá SEV kemur í aðru rød, samstundis sum SEV hevur skyldu at keypa avlopsel frá øðrum. Eisini stúrir felagið fyri, at sølutreytirnar kunnu broytast við skiftandi landsstýrum. Felagið heldur lítið um, at fjarhiti og el verða regulerað í somu lóg. Mett verður ikki, at veitingartrygdin verður sett í vanda, tí SEV hevur framvegis ábyrgd av veitingartrygdini og eigur og rekur skipanarberandi eindirnar, sum tryggja støðufesti í elskipanini. Eisini verður øll vindorkuframleiðsla javnsett. Søla av eli, sum ikki verður brúkt til egna nýtslu, kann seljast SEV, men bara avlopsel frá smáum verkum upp í 200 kW. Hetta er ein størri avmarking, enn áður hevur verið galdandi, tí reglur verða ikki ásettar um sølu av avlopseli frá størri verkum til egna nýtslu, fyrr enn ein arbeiðsbólkur, sum er settur við støði í punkti 10 í semjuskjalinum frá 2022, er liðugur við sítt arbeiði. Reglur um prísskipanir, viðskiftatreytir, íbinding o.a.m. verða, sum omanfyri nevnt, ásettar í kunngerð.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um møguleikan til økta framleiðslu, men tann møguleikin er, sum omanfyri nevnt, tikin burtur aftan á hoyringina, tí evnið er partur av semjuskjalinum millum landsstýrið og SEV frá mars 2022 og má tí bíða, til arbeiðsbólkurin hevur gjørt eitt tilmæli. Eisini vil felagið, at tiltøku- og íbindingargjøld verða eftirhugd, og verður hetta partur av arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum.

Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag mælir til, at tað altíð verða gjørdar árinsmetingar, áðrenn orkuútbyggingar verða gjørdar. Hetta er tikið til eftirtektar, og ásetingin um árinsmetingar er víðkað til eisini at fevna um fjarhitaútbyggingar.

Tórshavnar kommuna vil, saman við øðrum, at fjarhitin fær sína egnu lóg. Ynskið verður ikki gingið á møti, tí tað eru so mong felags viðurskifti galdandi fyri elveiting og fjarhitaveiting, at tað verður mett skynsamt at regulera virkisøkini í somu lóg. Vísir tað seg seinni at vera óheppið, kann talan gerast um at flyta fjarhitapartin, eins og møguligar aðrar orkuveitingar, í aðra serlóg.

Kommunan spyr eisini um innihaldsliga týdningin av ávísum hugtøkum, og eru hesi nú útgreinað antin í sjálvum ásetingunum ella í serligu viðmerkingunum. Kommunan vil, at lógin skal áseta brúksskyldu fyri fjarhitabrúkarar, men so langt fer uppskotið ikki. Hinvegin verður lagt upp til, at tey feløg, ið søkja um loyvi at reka fjarhitavirksemi, í umsóknini skulu gera greitt, um fjarhitavirksemið er treytað av brúksskyldu, og hvussu leingi brúksskyldan skal galda, fyri at verkætlanin hongur saman fíggjarliga. Brúksskylda verður roknað sum ein tyngjandi treyt fyri kundan, serliga um hon ikki kann sigast upp, og um hon ikki gevur lægri prís. Heldur ikki er óhugsandi, at fjarhitaskipanir verða gjørdar, sum ikki hava brúksskyldu fyri neyðini, og longu tí verður ikki mett skynsamt at áseta brúksskyldu við lóg.

Fjarhitafelagið vísir á, at krav má setast um back-up-skipan í fjarhitaveitingini, so veitingarskyldan kann verða hildin. Viðmerkingin er tikin til eftirtektar og krav ásett um tiltøkuskipan. Eisini heldur felagið, at krøvini til umsóknartilfarið eru ov yvirskipað, og tí eru tey betur útgreinað í serligu viðmerkingunum. Felagið vil eisini hava heimild til, at kommunur kunnu áleggja tíðarfesta brúksskyldu til fjarhita. Hetta er longu gjørligt og verður framhaldandi gjørligt. Eitt nýtt krav er eisini ásett, sum áleggur umsøkjaranum at vísa á, um ein hitaveitingarætlan er gjørd fyri økið, har fjarhitaskipan ætlandi skal leggjast. Umráðandi er, at útbygging av fjarhitaskipanum sampakkar við býarplanleggingina hjá kommununi, og at upphitingarútboð og tørvur á orkuveiting verða hugsað inn í langtíðarplanleggingina.

Annars fýlist Fjarhitafelagið á, at lógin fær afturvirkandi virknað fyri felagið. Hetta er ikki beinleiðis rætt, tí virksemið hjá felagnum, sum langt síðani er byrjað, fer at fáa loyvi fyri at

lógliggera virksemið frameftir. Loyvi verður latið við treytum, sum fevna um alla fjarhitaskipanina, sama nær fjarhitaleiðingarnar eru lagdar. Tað ber illa til at lóggeva fjarhitabrúkarum brúkaravernd, um fjarhitaveitarin ikki eisini verður fevndur av lógarverkinum. Fjarhitafelagið hevur eisini fleiri ferðir eftirlýst reglum á fjarhitaøkinum.

Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti tekur undir við, at krav um loyvi verður álagt fjarhitanum. Felagið heldur, at førleikakrøv eiga at verða sett nevndarlimum í fjarhitafeløgum. Ynskið er ikki gingið á møti, eitt nú tí eingi førleikakrøv heldur eru sett nevndarlimum í SEV. Mett verður eisini, at eigarar hava ein natúrligan áhuga í at seta fólk við førleikum í nevndina fyri at geva leiðsluni í felagnum eitt fakligt mótspæl. Eisini vil felagið hava lógarfestan rætt at sleppa burtur úr brúksskylduni. Heimild er í kunngerð at áseta neyvari reglur um vavið á brúksskylduni, um uppsøgn, prísáseting og aðrar viðskiftatreytir. Við kunngerðini verður brúkaraverndin ítøkiliggjørd, og sum kunnigt verða kunngerðaruppskot send í almenna hoyring, so allir áhugapartar sleppa til orðanna. Felagið vil eisini hava, at fjarhitafeløg, sum ein kommuna eigur í, verða fevnd av lógini um alment innlit, eins og t.d. er galdandi fyri Visit Faroe Islands. Viðmerkingin er tikin til eftirtektar.

Ein annað stórt ynskið hjá brúkarafelagnum er, at verandi fjarhitaskipan hjá Fjarhitafelagnum í Tórshavn verður góðkend í bitum samsvarandi útbyggingarstigunum grundað á serliga fíggjarlig atlit í útbyggingunum. Fordømi er um, at SEV varð álagt at føra aftur og regulera avskrivingar samsvarandi veruligu livitíðini hjá útbúnaði, sum íløgur eru gjørdar í. Hetta tí at ávísur útbúnaður hevði væl longri livitíð enn tey avskrivingaráramál, sum vóru nýtt frammanundan.

Hiddenfjord hevur ynski um at framleiða el til egna nýtslu í alingini og at selja SEV avlopið. Ætlanin var at loyva nærum óavmarkaða framleiðslu til egna nýtslu uttan krav um alment útboð, um miðalavlopið av eli í eitt ár ikki fór upp um tað, sum svarar til 1 MW. Ætlanin er fyribils slept, meðan ein arbeiðsbólkur arbeiðir við at útgreina punkt 10 í semjuskjalinum millum landsstýrið og SEV frá 2022, sum er soljóðandi: “At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið. Skipanin eigur at verða gjørd í 2022.” Arbeiðsbólkurin er júst farin til verka. Kortini loyvir lógaruppskotið óavmarkaða uppseting av sólorku á egnum bygningum til egna nýtslu. Hetta tí at sólorka ikki er eins avbjóðandi fyri elskipanina og vindorka.

Effo vísir á, at uppskotið er heldur ógreitt um, hvat letur seg gera uttan fyri elnetið hjá SEV. Nú verður staðfest í lógaruppskotinum, at tað bara skal vera eitt samhaldsfast flutnings- og býtisnet til elveiting. Hetta merkir, at tað ikki er heimild at lata øðrum loyvi til onnur elnet við sama endamáli. Effo vísir eisini á, at eisini SEV má skipa sína elsølu í sjálvstøðugum felag, men hetta verður ikki gjørt, tí semja er við landsstýrið um, at SEV framhaldandi skal kunna selja el á sama hátt sum higartil. Fer SEV at selja atknýttar tænastur aftur at siðbundnu elsøluni, rakar kravið um at stovna sjálvstøðugt sølufelag eisini SEV, og skal tað felagið góðkennast eins og onnur sølufeløg.

Sp/f Røkt vísir á, at tað er ov stórt inntriv, at loyvi krevst til alla framleiðslu oman fyri 11 kW. Hetta er ikki so, og verða tey smáu loyvini fyri mesta partin latin við standardtreytum. Felagið førir eisini fram, at tey halda samstarv um framleiðsluøki at ganga framleiðarum ov nær, og at framleiðarar heldur skulu hava framíhjárætt til sjálvir at troyta orkuframleiðsluna í framleiðsluøkinum. Viðmerkingin verður ikki tikin til eftirtektar, bæði tí at møguleikin við rullandi loyvum innan elframleiðslu er avskorin, og tí tað verður mett samfelagsliga skynsamt at seta krav um samstarv fyri at kunna gagnnýta framleiðsluøkini uttan avmarkingar frá verandi

loyvishavum, tí teirra virksemi í minstan mun verður ávirkað av møguligum øðrum loyvum í sama øki.

Eisini heldur felagið, at bert kommunalur fjarhiti skal hava krav um at hvíla í sær sjálvum, men hetta verður ikki tikið til eftirtektar. Fjarhitaveitingar skulu setast í ein samfelagsligan orkusamanhang og metast í mun til aðrar møguleikar fyri orkuveiting, sum standa seg við atliti at prísi, virkni, burðardygd o.tíl. At enda metir felagið, at ognartøkuheimildin er ov víð, men hetta verður afturvíst, og víst verður til ognartøkutreytirnar, sum eru lýstar í serligu viðmerkingunum. At víst verður til prísirnar hjá jarðarmyndugleikanum, er tí, at flestu orkuútbyggingar eru á lendi, sum er landbúnaðarjørð, og landsjørðin verður umsitin av Búnaðarstovuni. Verður ognarjørð ognartikin, verða prísirnir hjá Búnaðarstovuni vanliga eisini brúktir sum vegleiðandi fyri áseting av endurgjaldinum. Tó er vert at skoyta uppí, at enn er eingin ognartøka framd til frama fyri vindorkuútbyggingar.

Magn vil sleppa at selja tað el, sum felagið sjálvt framleiðir, og at eløkið verður skipað eftir sama leisti sum teleøkið. Eisini vil Magn hava, at SEV verður skilt sundur í tvey atskild feløg. Harumframt vil Magn hava atgongd at keypa seg inn í elnetið hjá SEV og fýlist á vantandi møguleikar at kappast við elprísirnar hjá SEV. Hetta tí at elmarknaðurin verður ov avmarkaður, við tað at hann ikki tekur framleiðsluna við. Ynskið frá framleiðarum um at sleppa at selja "sítt egna el" hevur javnan verið uppi og vent, men hvørja ferð er niðurstøðan, at tað ikki gevur góða meining í føroysku elskipanini og tí elmarknaði, sum nú verður settur á stovn. Sum nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so verður SEV sambært semjuskjalinum frá 2022 skipað øðrvísi frameftir, og verður umskipanin helst framd á komandi aðalfundi. Sambært uppskotinum verður tað nú staðfest í lógini, at tað framhaldandi bara skal vera eitt samhaldsfast elnet til allar elkundar í Føroyum, og tað er elnetið hjá SEV.

VITorka heldur tað vera kappingaravlagandi, at SEV sleppur at selja el í heilsølu og í smásølu, og at elmarknaðurin eigur at verða skipaður við einum prísregulerandi "intra-degi", sum gjørt verður á øðrum elmarknaðum. Orkumyndugleikin hevur viðgjørt spurningin, eitt nú við støði í umbidnu AFRY-frágreiðingini, men heldur, at skipanin er óneyðuga tung fyri ein isoleraðan og einfaldan føroyskan elmarknað. Eisini vísir felagið á, at BK17 má broytast, tí elorka er fyri vanbýti í mun til aðra orku, tá orkunormurin skal roknast. Viðmerkingin er tikin til eftirtektar, og verður orkunorumurin broyttur, tá bygningskunngerðin verður dagførd.

Vilhjálmur Nielsen, Danmarks Tekniske Universitet, vísir eitt nú á, at neyðugt er at allýsa, hvat hugtakið "til egna nýtslu" fevnir um, og er hetta partur av arbeiðinum, sum verður gjørt í arbeiðsbólkinum sambært pkt. 10 í semjuskjalinum frá 2022 eins og nevnt omanfyri. Eisini eru fleiri viðkomandi viðmerkingar innan fjarhitaøki, sum í mestan mun eru tiknar til eftirtektar, eitt nú er krav ásett um, at ein umsøkjari til fjarhitaverk skal upplýsa, um kommunan hevur gjørt eina hitaveitingarætlan fyri økið. Viðvíkjandi ynskinum um betri samsvar millum tekniska livitíð á fjarhitaleiðingum og avskrivingartíð og loyvistíð er at siga, at hesum verður ikki gingið á møti. Sami spurningur er annars fleiri ferðir áður viðgjørdur av orkumyndugleikanum, eitt nú tá ið ræður um elframleiðsluloyvi úr vatni.

Loyvistíðin fyri loyvi til fjarhitavirksemi verður 20 ár eins og fyri elframleiðsluloyvi, men við møguleika fyri at leingja loyvið fleiri ferðir, júst tí at fjarhitaútbúnaðurin hevur væl longri livitíð enn nógvur framleiðsluútbúnaður á eløkinum.

Jens Martin Lamhauge vísir á, at tað eru tær fáu og stóru kommunurnar í SEV, sum seta ferð og kós á orkuskiftið. Ynskið verður sett fram um, at framtíðar orkuútbyggingar í størri mun verða framdar í samráð við tær kommunur, har orkuútbyggingarnar verða gjørdar. Til hetta skal

vísast á, at orkumyndugleikin og SEV hava í felag gjørt eina tíðarfasta orkuútbyggingarætlan fyri komandi 5 árini sambært § 11, stk. 3, í elveitingarlógini, og hevur landsstýrið verið í beinleiðis samskifti við tær kommunur, har hesar orkuútbyggingar helst verða gjørdar eftir tíðarføstu ætlanini.